

## FAKTA **BROTSGERÐIN**

Brotsgerðin er donsk sjónvarpsrøð, sum Danmarks Radio framleiðir og sendir. Sjónvarpsrøðin verður eisini send í Sjónvarpi Føroya. Ætlanin var, at fyrstu 10 partarnir av Brotsgerðini skuldu sendast í 2007, og síðani skuldu 10 partar afturat sendast í 2008, men sendirøðin gjørdist so populer, at DR valdi at senda allar 20 partarnar í 2007. Onnur røðin av Brotsgerðini er eisini 20 partar, og DR fór undir at senda røðina í farna mánaði.

## FAKTA **SOFIE GRÅBØL**

**Aldur:** 41 ár
**Starv:** Sjónleikari
**Familja:** Einlig mamma við barni
**Filmar:** Barndommens Gade, Pelle Erobreren, Sort Høst, Sekten, Den Eneste Ene, Blinkende Lygter, Anklaget, Vikaren og fleiri
**Sjónvarpsrøðir:** Taxa, Nikolaj & Julie, Brotsgerðin og fleiri
**Virðislønir:** Bodil-virðisløn í 1987 og 1994. Robert-virðisløn í 1987, 1994, 2000, 2005 og 2006. Reumert-virðisløn í 2008.

*- Í grundini skuldi Sarah Lund gingið í jakkasetti og víst, at hon var ein hørð kvinna, sum kláraði seg í einari mansverð. Men tá eg sá hasa fyrstu troyggjuna, gjørdist eg bara so glað, tí hon segði alt um Sarah Lund, sum hon skuldi siga, sigur Sofie Gråbøl*

**MYND:** TINE HARDEN/DR